PRIX

Prix Føroyar er ein tónleikakapping, sum Norðurlandahúsið í Føroyum skipar fyri í samstarvi við Føroya Undirhaldstónleikarafelag (FUT), Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya. Kappingin hevur verið hildin annað hvørt ár síðani 1995.

Kappingin er skipað við fimm innleiðandi umførunum, har vinnarin í hvørjum umfari kemur í finaluna. Bólkarnir, sum enda sum nummar 2 til innleiðandi umførini, skulu kappast í eini hálvfinalu, har vinnarin fær seinasta finaluplássi.

Øll tey innleiðandi umførini verða hildin í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Finalan verður í Norðurlandahúsinum í Havn.

29 bólkar eru við í kappingini í ár. 6 bólkar sleppa í finaluna.

**1. umfar,**
**25. januar kl. 21.00**
Headache Blues Treo
Human Chaos
Søren Søgaard
S.C.A.T.G.O.H
Flux
MC Hár

**2. umfar,**
**1. februar kl. 21.00**
Déjá Vu
Masha
Mind's Eye
onkikanndiskuterast.alt kann
Speaker
Holgar og Villmenn

**3. umfar,**
**15. februar kl. 21.00**
Bracket
Crashwave
Mary's Baby
Lawetz
Krit

**4. umfar,**
**22. februar kl 21.00**
Makrel
Chain
Side Effect
Fluffy Toys
MMM
Páll Finnur Páll

**5. umfar,**
**8. mars kl. 21.00**
Týr
Zink
Blív
Jam
Gestir
Hatespeech

# Sosialurin er við



*Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóri*

Prix Føroyar er ein týðandi og mennandi kapping fyri føroyskan tónleik. Samstundis sum Prix Føroyar hevur verið ein afturvendandi táttur seinastu átta árini, hevur føroyskur tónleikur ment seg nógv.

Avrikini seinasta árið geva boð um, at vit skjótt kunnu fáa ein ella fleiri kendar tónleikarar og bólkar uttanlands. Teitur Lassen, Týr, Clickhaze, Brandur Enni, Pætur við Keldu, Eivør Pálsdóttir og onnur hava gjørt vart við seg, og tá ið hendan Prix-kappingin er farin aftur um, hava vit ivaleyst onnur spennandi nøvn at bjóða fram.

Prix Føroyar eigur lut í menningini. Vit hava í fleiri ártíggjund havt góðar tónleikarar og tónleikabólkar, men við Prix Føroyum eru føroyskir bólkar í enn størri mát enn áður farnir at spæla egið tilfar og at royna veingirnar við yrkingum og løgum hjá sær sjálvum.

Vit hava havt nøvn sum Kára P., Faroe Boys, Tey á Kamarinum, Straight Ahead, Absurdy Fair, Vestmenn, Frændur og nógv, nógv onnur, sum hava spælt sangir hjá sær sjálvum, og allir hesir mongu tónleikarar eiga sín lut í, at føroyskt tónleikalív hevur ment seg gjøgnum seinastu 40 árini. Tey hava kveikt, undirhildið, glett og hugtikið føroyingar. Tey hava saman við øðrum lagt lunnar undir tað tónleikalív, sum vit hava í landinum í dag. Og nú kunnu vit rættiliga fegnast um, at útlandið meira enn áður hevur vent eyguni ímóti føroyskum tónleiki. Møguleikarnir eru har, og vit eiga sum tjóð at fegnast um, at tað gongur okkara tónleikarum væl bæði heima og úti.

Sosialurin hevur altíð tikið føroyskt mentanarlív í størsta álvara, og vit hava eisini gjørt nógv burtur úr tónleiki í blaðnum seinastu mongu árini. Vit hava dugnalig blaðfólk, sum hava gott innlit í tónleikalívið, og vit hava lagt doyðin á at bera tíðindi, ummæla og umrøða føroyskan tónleik. Sosialurin hevur eisini verið við í útgávunum av føroysku tónleikaárbókunum.

Tí er tað sjálvsagt, at Sosialurin verður við í fremstu røð, nú fimta Prix Føroyar tónleikakappingin fer av bakkastokki. Vit fara at gera meira burtur úr kappingini enn nakrantíð áður, og tit skulu verða vís í, at tit fáa øll tey týðandi tíðindini, umrøðurnar, ummælini og samrøðurnar frá okkum.

Okkara blaðfólk og myndafólk fara at kýta seg fyri at geva tykkum gott innlit í kappingina, og vit seta neyðugt pláss av í blaðnum, so tit kunnu uppliva kappingina bæði í orðum og myndum.

Vælkomin til Prix Føroyar í Sosialinum.



*Brandur Enni er ein av teimum, sum í farna ári hevur gjørt vart við seg uttanlands. Hann fer í hesum árinum at geva tónleik út í Danmark og í Íslandi*

*Mynd: Jens Kristian Vang*




# Vegur til útlandið



*Eyðun Klakstein*

Leygarkvøldið byrjar fimta Prix Føroyar tónleikakappingini. Stórsligna og spennandi tiltakið hevur stóra undirtøku millum føroyingar, og tað verður trupult at sleppa undan kappingini, nú mikrofonir, upptøkutól og myndatól í hópatali verða vend ímóti tónleikarunum og bólkunum, sum eru við.

Prix Føroyar er nógv. Tað er ein pallur til bólkar, sum ikki sleppa fram at nógva aðrastaðni. Tað er ein gyltur møguleiki hjá ungum og royndum tónleikarum. Tað eru sjey konsertir við føroyskum tónleikabólkum, sum gera sær stóran ómak við sínum egna tónleiki. Tað er ein kapping. Tað er undirhald. Og tað er sanniliga eisini ein møguleiki hjá vónríkum tónleikarum at sleppa út um landoddarnar at spæla.

Prixið er ein av gøtunum, sum kunnu føra til gjøgnumbrot uttanlands. Útlendskir gestir eru fastir fúsir til finaluna, og tí er tað møguleiki hjá bólkunum at gera vart við seg, tá ið oyruni og eyguni hjá útlendskum plátufelagsfólkum, festivalfyriskiparum og blaðfólki eru vend ímóti føroyska tónleikapallinum.

Fyrireikararnir av Prix Føroyum hava snildisliga bjóðað útlendskum gestum til finaluna í Prixnum, og tað hevur síðani víst seg, at tá ið hesi fólk hava fingið smakk fyri føroyskum tónleiki, hava tey sjálvi leitað aftur á slóðina, tá ið møguleiki hevur verið fyri tí. Tað hevur havt við sær umrøður, upptøkur og framførslur uttanlands.

Tónleikararnir skulu tó ikki gloyma, at fyri tað, um teir uttan stórvegis hóvsták kunnu spáka inn á ein væl upplýstan pall í Fuglafirði, har hvør tóni verður varpaður út í Útvarpinum og møguleiki er fyri heimligum gjøgnumbroti, so krevst veruliga nakað av teimum. Tað ræður um at hanga í, at vísa vilja, at gera sær ómak, at tora og ikki geva upp, tá ið mótgongd er. Onkrir bólkar hava fingið gjøgnumbrot av næstan ongum stríð, men fyri teir allarflestu kostar tað blóð, sveitta og tár. Og tá ið talan er um útlandið, er tað veruliga sum við kamelinum og nálareyganum. Vinningurin kann vera stórur, men stríðið er drúgt og krevjandi.

Sosialurin fer at seta sjóneykuna á Prix Føroyar og føroyskan tónleik komandi vikurnar. Vit ætla okkum at umrøða allar kappingarnar, vit fara aftur um bólkar og tónleikarar, vit fara at bera fesk tíðindi, spennandi samrøðurnar, ummæli og bakgrundsgreinar. Og vit hava eisini eina meining, sum verður afturvendandi táttur á hesum staði.

Hvønn fríggjadag áðrenn innleiðandi umførini hava vit greinar, tíðindi, samrøður og viðmerkingar um bólkarnar, kappingina og annað. Sosialurin fer sjálvsagt at hava blaðfólk og myndamenn við til øll tey innleiðandi umførini og finaluna, og í týsdagsblaðnum ber til at lesa alt um kappingarnar. Annars verða eisini greinar í blaðnum hinar dagarnar, tá ið okkurt er áfatt.

Við hesum seta vit ferð á og ynskja bólkunum góða eydnu í kappingini. Vónandi fáa vit nógvar spennandi, undirhaldandi og gevandi tónleikaupplivingar komandi vikurnar.



# Solisturin Søren

**Danski vísutónleikarin starvast á Høvdavirkinum í Leirvík, men hann hevur annað í høvdinum enn høvd. Leygarkvøldið fer hann einsamallur á pallin í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Um hálsin hongur ein gittar, og høvdið er kalt**

SOLISTUR
*Eyðun Klakstein*

– Eg veit ikki rættiliga, hví eg eri við í Prixnum.

Søren Søgaard verður næstan tikin á bóli av spurninginum. Men hann fótar sær.

– Kanska er tað fyri at vísa, at eg eri til, og at eg eri komin aftur til Føroya, leggur hann so afturat.

Søgan um danska tónleikaran, sum endaði í Føroyum, byrjar í 1989, tá ið hann fyrstu ferð hevði føroyska grund undir fótunum. Men tað var meira ella minni tilvildarligt.

– Eg var á veg heim til Danmarkar eftir eina ferð í Íslandi. Eg var við Norrønu, og vit løgdu at í Havn á ferðini heim. Eg gekk og mól nakrar tímar í Havn, og eg hugsaði beinan vegin, at her mátti vera gott at búgva, greiðir Søren frá.

Seinni fór hann við jøvnum millumbili at ferðast til Føroya fyri at spæla saman við Bergmonnum. Sambandið við Njál Sigurðjónsson, sum var annar av monnunum í bólkinum, var gott, og teir sendu av og á boð eftir Søren.

## Skrivar til skuffina

Miðskeiðis í nítiárunum kom Søren til Føroya at arbeiða sum lærari, og hann var her í tvey ár, áðrenn leiðin aftur varð løgd til Danmarkar. Men tokkin til Føroya var framvegis stórur, og nú hann hevur fingið føroyska konu, var kósin aftur sett út í Atlantshavið.

Tey komu til Føroya síðsta summar og hava búsett seg í Leirvík.

Søren vaks upp í miðjútska býnum Brande. Har er tiltikið listasavn, og fleiri av vinmonnum hansara eru listamenn í dag. Sjálvur hevur hann altíð havt áhuga fyri list, og hann hevur størstan hug sjálvur at fáast við tónleik og at skriva.

– Eg havi skrivað nógvar yrkingar, onkrar stuttsøgur, og eg havi eisini roynt meg við eini skaldsøgu. Eg skrivi fyri tað mesta til skriviborðsskuffina, men eingin veit, hvat tað kann blíva til seinni, sigur hann.

## Formaður í Grót

Søren var ein av teimum, sum var við til at stovna Tónleikasamtakið Grót í Gøtu, og hann hevur eisini spælt á onkrum tiltøkum hjá teimum, síðani hann kom aftur til Føroya.

– Eg var ikki tann, sum kom við hugskotinum til Grót, men eg tók undir við tí. Eg var fyrsti formaðurin í felagnum, og eg eri errin av at hava verið við í einum felagi, sum hevur fingið so nógv gott á skafti, sigur hann.

Í fjør gav Søren Søgaard út eina fløgu við sangum hjá sær. Tónleikurin, sum hann fer at spæla á Prixnum leygarkvøldið, er í sama duri sum útgávan. Hann ætlar sær at spæla tveir blues-sangir og tvær meira róligar vísur. Sangirnar hevur hann sjálvur skrivað.

Søren er cand. mag við religión og týskum, men útbúgvingin verður ikki brúkt til fulnar, nú hann starvast á Høvdavirkinum í Leirvík.

– Eg kundi hugsað mær at farið at undirvíst aftur, men tað skal ikki vera í fólkaskúlanum, tí tað dámar mær ikki. Kanska ein møguleiki fer at bjóða seg á onkrum miðnámsskúla, sigur hann.



*Søren Søgaard var fyrsti formaður í Tónleikasamtakinum Grót. Nú roynir hann seg í Prix Føroyum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

PRIX

**Hálvfinala,**
**15. mars kl. 21.00**
Allir bólkarnir, sum endaðu sum nummar 2 í teimum fimm innleiðandi umførunum, kappast um eitt pláss í finaluni

**Finala, 26. apríl**
Tann stóra finalan í Norðurlandahúsinum. Seks finalistar kappast um sigurin í kappingini og møguleikan at spæla á donskum festivalum.

**Dómarar**
10 dómarar meta um framførslurnar hjá bólkunum til tey innleiðandi umførini. Teir geva bólkunum stig fyri teir ymsu partarnar av framførsluni. Stigini hjá øllum dómarunum verða tald saman, og síðani verður vinnarin funnin. Í finaluni eru 26 dómarar.

**Vinnarar**
1995: Moira
1997: Mark No Limits
1999: Taxi
2001: Clickhaze

**Atgongumerki**
Atgongumerki til innleiðandi umførini kunnu keypast á Kunningarstovunum kring landið, í Mylnuni í Miðvági og á Shellstøðini í Gøtudali. 600 fólk sleppa inn til hvørt umfar. Eisini ber til at keypa eitt sonevnt Prix-pass, sum er atgongumerki til øll umførini.

**Bussar og ferja**
Í sambandi við kappingina leygarkvøldið koyra bussar til og frá tiltakinum.

Bussar fara úr Vestmanna, Sørvági og úr Havn kl. 20.00

Bussar fara av Toftum og Strondum kl. 20.30. Teir steðga ávíkavist í Leirvík og í Gøtu kl. 20.50.

Aftan á tiltakið koyra bussarnar heim aftur.

Dúgvan siglir av Fuglafirði til Klaksvík kl. 03.45. Ferðaseðlar skulu keypast í Norðoya Kunningarstovu og í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

**Prixið í Sosialinum**
Lagt til rættis:
Eyðun Klakstein
Teldupostur:
eydun@sosialurin.fo